Nýfloygd pisa:

# 0 % fráveru

**Erla Bech Jensen úr Havn hevur ikki forsømt nakran tíma, tey trý árini hon hevur gingið í Studentaskúlanum í Hoydølum. – Eg elski at ganga í skúla, sigur Erla, og tað er eftir øllum at døma frágreiðingin uppá eitt væleydnað stu**

SKÚLAGONGD

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Hugsa tær ein gráan týsmorgun í november. Regnið slær á vindeygað í kamarinum. Eingin er inni at hála teg upp úr songini. Tá er lætt at venda sær á hina liðina, lata skúla vera skúla og fara aftur í dreymaverð. Og vit eru eisini fleiri, ið eru fallin fyri freistingini.

Men soleiðis hevur 18 ára gamla Erla Bech Jensen úr Havn tað ikki. Hon hevur nevniliga møtt upp til hvønn einasta tíma tey trý árini, hon hevur gingið í Hoydølum.

- Tað hevur verið ein sera góð tíð, men eg eri glað fyri, at royndirnar nú kunnu leggjast afturum bak, og at alt er yvirstaðið. Tað er tó við einum farra av sorgblídni, at man nú sigur farvæl, sigur hon.

### Franskt var yndismálið

Erla hevur gingið á málsligu deild í ð-flokkinum, eisini nevndur 02ð. Erla væntar at fáa knapt 10 í meðal í próvnum.

Spurningurin nú er sjálvandi, hvat prógvið skal nýtast til.

- Eg havi ofta hugsað um at lesa franskt víðari. Tað var eisini mín yndislærugrein í Studentaskúlanum, greiðir Erla frá, og hon leggur flennandi afturat, at hon eisini skoraði eitt 11-tal í munnligu royndini í fronskum.

- Eg havi havt ein dreym um at læra franskt til lítar og síðani at undirvísa børnum í afrikanska landinum Senegal í sambandi við missiónsarbeiði, sigur Erla. Tí er ein møguleiki, at hon fer at lesa franskt víðari, men enn er eingin endalig støða tikin tí viðvíkjandi.



*Erla avmyndað við akkerið av skipinum Góðanesi, sum fór við Flesjarnar í 1957*

*Mynd: Bárður*

Fyri fyrst fer hon at leita sær eftir onkrum fyrifallandi arbeiði her heima, áðrenn leiðin møguliga gongur út í heim.

### Longu sæð heimin

Erla hevur stóran áhuga fyri missiónsarbeiði, og hon hevur verið við foreldrunum úti í heimi í hesum sambandi.

Í eitt ár hevur hon siglt við trúboðaraskipinum Doulos, har pápin var skipari og mamman starvaðist í móttøkuni. Erla var bæði dekkari og starvaðist í bókasøluni umborð á skipinum, sum eisini hevur vitjað í Føroyum nakrar ferðir.

Hesa tíðina, tá familjan var umborð, sigldi skipið mest í Asia, og tí hevur hon hóast sín unga aldur longu vitjað tey flestu londini í Landsynningsasia.

Árið eftir sigldi hon eisini í tveir mánaðir í Karibiska havinum við einum øðrum trúboðaraskipi, ið nevnist Logos.

Vanligt er, at nýklaktar pisur hava ætlanir um at fara út í heim og uppliva aðrar mentanir og fremmand lond. Men Erla hevur longu vitjað fleiri lond, enn fleiri okkara vitja ígjøgnum eitt heilt lív.

Hon metir, at hetta hevur ment hana sum persón og harvið hjálpt henni í skúlanum – eisini tí, at hon hevði eitt sabbatár umborð á skipinum, áðrenn hon byrjaði í studentaskúlanum.

### Var við í Jósef

Tá næmingar í studentaskúlanum í fjør settu upp stórsligna leikin um Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið, var Erla eisini mitt í rokanum. Hon hevði ein tann størsta leiklutin sum upplesari í leikinum.

Hóast tað var strævið og tíðarkrevjandi at vera við, gekk tað ikki út yvir skúlagongdina. Erla hevur nevniliga havt eina fyrimyndarliga uppmøting. Hon er ongantíð skrásett sum fráverandi hesi trý. Nú kann hon njóta komandi dagarnar við góðari samvitsku.

Eitt tíðarskeið er nú liðugt, og ta eitt nýtt stendur fyri framman hjá øllum teimum, ið júst hava nomið sær miðnámsútbúgving á studentaskúla, HF-skeiði, handilsskúla ella teknisk-um skúla.

# Læknin hevur orðið

**Kendi danski sjónvarpslæknin, Peter Qvortrup Geisling, hevur verið í Føroyum seinasta vikuskiftið og hildið skeið fyri starvsfólki hjá fyritøkum**

VITJAN

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Hetta er aðru ferð innan stutta tíð, at danski læknin vitjar í Føroyum. Síðst framleiddi hann eina sending úr Føroyum, men hesuferð hava ørindini verið at hildið skeið ella fyrilestur fyri starvsfólki.

Fyrilestrarnir hava mest snúð seg um samskifti og strongd. Starvsfólkið á nøkrum størri føroyskum fyritøkum hava havt høvi at hoyra danska læknan, ið er kendur fyri sendingina "Lægens bord" á DR.




*Peter Qvortrup Geisling hevur hildið fyrilestrar fyri starvsfólki á nøkrum størri føroyskum fyritøkum. Her stendur hann í Lærara-skúlahøllini fríggjakvøldið. Í bakgrundini sæst ein forsíða, ið BT hevði um læknan fyri kortum. Yvirskriftin ljóðar "Forsker anklager TV-lægen: Lokker unge til selvmord". Hetta er eitt dømi um, hvussu boðskapurin í hansara sendingum onkuntíð hevur verið misskiltar millum fólk*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

### Fleiri hemoridir í bløðunum

Danski læknin hevur rakt eina nerv við sínum sendingum um heilsu. Stórur áhugi er fyri hesum evninum, og fjølmiðlarnir geva sær møguliga ikki nóg stórt far um, at slíkt tilfar ofta fangar lesarar, lurtarar og hyggjarar.

- Eg havi havi ofta sagt til stuttleika, at tað skuldu verið fleiri hemoridir í bløðunum, sigur Peter Qvortrup Geisling.

- Fólk hava stóran áhuga fyri fjølmiðlatilfari, ið snýr seg um heilsu og ymsar sjúkur, og tí kunnu fjølmiðlarnir vinna nógv við at hava slíkt tilfar við, greiðir læknin frá.

### Kemur aftur

Sjónvarpslæknin hevur mest nýtt hesa ferðina at hyggja seg um í Føroyum, og hann hevur eitt nú verið útferð í Kalsvík á Kalsoynni og hugt eftir fuglabjørgunum har.

Peter Geisling sigur, at hann hevur ætlanir um at koma aftur hendavegin, men honum dámar best, um onkur verkætlan er knýtt at ferðini, og hann hevur leysligar tankar um, at hann møguliga fer at gera okkurt fjølmiðlaátak næstu ferð hann kemur til Føroya.